# Føroya Handarbeiðskúli húsvillur

**Føroya Handarbeiðsskúli hevur higartil hildið til í hølunum hjá Húsmøðrafelagnum í Bøgøtu. Men nú skulu tey hølini nýtast til annað endamál, og tískil er Handarbeiðsskúlin í løtuni húsvillur. Bæði leiðari og lærarar harmast støðuna, tí undirtøkan fyri skeiðunum á skúlanum er góð**



*Hølini hjá Húsmøðrafelagnum skulu framyvir hýsa Frítíðarskúlanum í Klaksvíkar Kommunu*

HØLISTRUPULLEIKAR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Eigil Hentze, sum tekur sær av tí umsitingarliga partinum av skúlanum sigur, at hann veit onki um nøkur nýggj høli til skúlan, sum er.

– Tað vísir seg at vera sera torført at finna høli til ymisk tiltøk í Klaksvík, og er tað onki undantak, tá tað kemur at finna høli til handarbeiðsskúlan, sigur Eigil.

Hann heldur, at tað átti kortini ikka at verið ógjørligt at funnið høli til skúlan, tí tey krevja ikki so nógv.

Skúlin er skipaður á tann hátt, at smá dagskeið verða koyrd. Summi nakrar dagar upp í slag, meðan onnur eru yvir nakrar spjaddar dagar.

– Skúlin nýtir eitt nú hølini hjá Vevskúlanum úti í Grøv til vevingina. Og tað sum skúlin krevur av plássi svarar til eina skúlastovu, sigur Eigil Hentze, sum tí heldur, at tað átti at kunnað latið seg gjørt at funnið eini hóskandi høli.

Hann sigur eisini, at um høli ikki verða funnin, so er spurningurin sjálvandi um skúlin kann halda fram.

– Men tað er so ein politiskur spurningur, sigur Eigil.

Tað er Klaksvíkar Kommuna, sum tekur sær av at finna eini høli til skúlan. Orsøkin til tað er, at skúlin hoyrir undir frítíðarundirvísingina hjá kommununi.

Hølini hjá Húsmøðrafelagnum, sum higartil hava hýst Handarbeiðsskúlanum skulu nú nýtast til Frítíðarskúlan hjá Klaksvíkar Kommunu. Frítíðarskúlin hevur annars hildið til í hølum hjá KÍ, men av tí at talið á børnum nú verður uppnormerað, so er tørvur fyri einum hølum, sum eru størri.

## Dagskúli

Føroya Handarbeiðsskúli er ein dagskúli, sum byrjaði sítt virksemi miðskeiðis í níti-árunum. Tá varð ein avtala gjørd millum kommununa og táverandi Landsskúlafyrisitingina um at koyra skúlan sum eitt royndarprojekt og so arbeiða fram í móti at menna skúlan til at blíva til ein skúla, sum skuldi líkjast Føroya Húsarhaldsskúla, sum er ein skúli, har næmingarnir búgva á skúlanum, meðan skeiðið er. Men tað skeiðið varar í átta mánaðir, meðan Handarbeiðsskúlin bert hevur smá skeiðir.

Men tað er so ongantíð komið so langt, tí skúlin koyrir framvegis sum ein skúli við smáum dagskeiðum.

Paulina Eliasen av Syðradali er ein av trimum lærarum, sum dagliga hava tilknýti til skeiðini á skúlanum. Hon sigur, at tær onkuntíð eisini fáa onkran annan handarbeiðslærara inn til eitt hvørt, men tað er í høvuðsheitum hon og tvær aðrar, sum undirvísa á skúlanum.

Tær undirvísa sum sagt í handarbeiði, har denturin verður lagdur á tað føroyska handarbeiði, so sum veving, tøving, garva skinn og roð, binding, føroysk bond og broderí til føroyska kvinnu- og mansbúnan.

Umframt hesi skeiðini hava tey eisini onnur skeið á skúlanum, sum verða, tá undirtøkan er nóg stór.

Paulina sigur, at áhugin fyri skeiðunum hevur verið vaksandi seinastu árini, og tí heldur hon, tað verða ómetaliga synd, um ongi høli verða funnin til skúlan. Tí so verða so at siga ongin skeið komandi ár.

Hon greiðir frá, at næmingarnir til skúlan koma allastaðni frá í landinum. Serliga eru nógvir eysturoyingar.

– Men tað koma sanniliga eisini fólk aðrastaðni frá. Tað er bara tað, at um fólk mugu gista her, so noyðast tey at finna eina loysn sjálvi, tí skúlin er bert ein dagskúli – enn, sigur Paulina.

Her sipar hon til avtaluna millum Klaksvíkar Kommunu og Landsskúlafyrisitingina, sum tað æt tá, um at skúlin við tíðini skuldi fara at líkjast meiri og meiri Húsarhaldsskúlanum.

Paulina sigur, at í byrjanini tá høvdu tey eitt skeið, sum vardi fimm mánaðar, men tað vísti seg ikki, at vera nóg góð undirtøka fyri tí. Tí byrjaðu tey upp á at hava smá skeið, har fólk so kundu tekna seg til. Og tað gjørdi mun.

– Undirtøkan er sera góð í dag. Tað var strævið at byrja, men eg haldi, at tað altíð er strævið at byrja við onkrum og byggja tað upp. Men tað gongur so mikið nógv betri í dag, at tað er synd, um skúlin skal forfarast, tí ongi høli eru til taks, heldur Paulina Eliasen.

## Finna skjóta loysn

Jórun Høgnesen, formaður í mentunarnevnd Klaksvíkar Býráðs, sigur, at hon hevur verið so nógv burturstødd orsakað av sjúku í familjuni, at hon enn ikki hevur megnað at sett seg nóg væl inn í málið til at kunna úttala seg nágreiniliga um støðuna, sum hon er í dag.

– Men tað er givið, at eftir summarfrítíðina, so mugu vit, sum vara av hesum máli, sessast og finna eina skjóta loysn upp á henda hølistrupulleika, sigur Jórun Høgnesen í viðmerking til málið.

Petra J. Joensen, stjóri á Almannastovuni:

## - Hava ikki heimild at hjálpa

**Petra J. Joensen sigur, at tað skal nógv til, áðrenn ein persónur, sum ynskir at verða heima hjá sjúkum barni ella hjúnarfelaga kann koma undir dagpeningalógina**

ALMANNAHJÁLP
*Solby A. Eliasen*

– Fyrst skal tað staðfestast, at talan er um álvarsliga sjúku. Og dagpeningalógin tulkar álvarsliga sjúku, at tað so stendst heilsu- ella lívsvandi av sjúkuni. Og haraftur at skal tað so ein læknaváttan til har tað stendur, at tað er alneyðugt at sjúklingurin fær hjálp, greiðir Petra J. Joensen frá og hon leggur aftur at, at ein so kann siga, at handan paragrafin, sum sigur hatta, er sera smøl. Og tí skal tað so nógv til, áðrenn fólk kunnu metast at koma inn undir hana.

– Og vit kunnu ikki veita almannahjálp, tá ein persónur ikki lýkur krøvini, tí vit ikki hava heimild til tess, sigur Petra.

Hon sigur eisini, at tað eru mong, sum hava tørv fyri at verða heima hjá teirra sjúka barni, men um ikki talan er um tey viðurskiftini, sum verða nevnd í § 3, so koma hesi fólk stutt sagt ikki undir dagpeningalógina, og verða tá víst til forsorgarhjálp. Og forsorg verður veitt eftir tørvi. Tað vil siga, at hvørt einstakt mál verður tikið upp og so verður tað mett um, hvør tørvurin er fyri forsorgarhjálp.

Í greinini í blaðnum í gjár, vístu hjúnini Klein á, at tey hildu tað verða ov nógv at bjóða einum vini ella limi í familjuni at verað noydd/ur at vera hjá Eriki hvønn dag í tveir mánaðar.

Spurd um ikki, tað so átti at verið ein uppgáva hjá Almannastovuni at veitt foreldrum, sum koma í somu støðu, sum hjúnini Klein av Kambsdali, ein stuðul til tílíkt ella fyri tað minsta pengingin til at rinda fyri ein stuðul, sigur Petra, at tað kann hon ikki úttala seg um á standandi fót, tí hon ikki hevur nóg gott innlit í tað málið.

– Okkara arbeiði er at umsita lógina og avgera um ein umsøkjari kemur inn undir dagpeningalógina ella ikki. Tá avgerð er tikin um, at ein persónur ikki kemur undir dagpeningalógina, so royna við altíð at boða frá hesum á ein góðan hátt, sigur Petra J. Joensen, stjóri á Almannastovuni og leggur at enda enn einaferð dent á, at hóast tað generelt er best, at onkur er heima hjá einum sjúkum barni, so umfatast tey ikki av dagpeningalógini.

# Hetlendingar til Føroya at rógva

**Í samband við stevnuna, sum verður í Suðuroy um vikuskiftið er eitt ferðalag av hetlendingum í Føroyum. Tey hava kappróðrarbátar við sær og ein av bátunum er gamal kenningur á vánni í Klaksvík**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Hetlendingarnir koma til Klaksvíkar mikukvøldið um sjey tíðina, har tey skula verða inntil vikuskiftið.

Ætlanin hjá hetlendingunum er, at fáa eitt samband í lag við Klaksvíkar Róðrarfelag, soleiðis at tað kanska fer at verða møguligt hjá feløgunum báðum at vitja hvørt annað av og á. Hetlendingarnir fara fyrst út at eta og hava boðið umboðum fyri Klaksvíkar Róðrarfelag við. Orsøkin til, at hetlendingarnir fyrst koma til Klaksvíkar er, at tíggjumannafarið, sum tey hava við sær, er tann gamli Klaksvíkingur, sum tey keyptu frá Klaksvíkar Róðrarfelag, tá tann nýggi Klaksvíkingurin varð bílagdur.

Sosialurin fræettir, at ætlanin er, at hetlendingarnir og limir úr Klaksvíkar Róðrarfelag fara at rógva kapp til stuttleika á vánni í Klaksvík hósdagin. Tá fáa fólk í Klaksvík so høvi til at síggja gamla Klaksvíking rógva í móti nýggja Klaksvíkingi. Kvinnur fara eisini at rógva kapp hendan dagin, og verður tað væntandi við seksmannaførum.







*Hans Carl Hansen og Búi Dam, eru millum gittarleikararnar sum fara á pallin, tá 10 føroyskir gittarleikarar vísa kynstur síni á listastevnuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tíggju føroyskir gittarleikarar spæla á Listastevnu



LISTASTEVNA
*Tíðindaskriv*

Í Føroyum eiga vit mangar ymiskar og frálíkar gittarleikarar, og í røttum rokktónleiki er tað altíð gittarin, sum er miðdepulin.

Kring gittaran savnast á Listastevnuni tíggju frágera føroyskir leikarar í Neystinum í Runavík, í Høllini í Norðurlandahúsinum og í Atlantis í Klaksvík. Høvi verður eisini at síggja ein gittara, sum runavíkingurin, Petur M. Bjarnastein, hevur bygt.

Teir tíggju gittarleikararnir eru: Ólavur Øster, Hans Carl Hansen, Hildibjartur Hansen, Eyðun Hansen, Herluf Lützen, Petur Hans Niclasen, Sofus Poulsen, Búi Dam, Ólavur Jakobsen og Hjalti Joensen.

Afturvið teimum tólv spæla Magnus Johannesen, keyboard, Kolbein Simonsen, bass og Rógvi á Rógvu, trummur. Eisini fer Lena Andersen at syngja afturvið gittarspælinum hjá Hildibjarti Hansen.

Millum seldu atgongumerkini til gittarkonsertirnar verður burturlutaður ein ektaður føroyskur handbygdur Bjarnasteingittari, sum sýndur verður fram í Norðurlandahúsinum.

Gittarkonsertirnar verða Fríggjadagin 9. august í Neystinum í Runavík kl. 21, sunnudagin 11. august í Høllini í Norðurlandahúsinum kl. 21 og leygardagin 17. august í Atlantis í Klaksvík kl. 21. Tað er Erik Biskupstøð, sum samskipar tiltakið fyri Listastevnu Føroya.


Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Haraftur at fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Haraftur at er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflyggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Fýra politistar skulu setast í 2003.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/9-2002